# Stýrisfundarbók FKF

## 13-12-2011 / 13

*Fundarstað:* Viðareiði

*Fundur byrjar kl:* 10:00

*Fundur lokin kl:* 12:30

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Erik Davidsen | |
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | Avboð |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 54**

FKF Jour. nr: 09-160

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Sjálvlesandi, kunngerðaruppskot

Málslýsing: Í telduposti dagf. 15. novembur, bjóðar Mentamálaráðið felagnum at viðmerkja kunngerðaruppskot viðv. teimum lesandi. Sí skjal 54.

Málið var lagt fyri MS bólkin við hesum viðmerkingum:

Uppskotið er helst sent felagnum til viðmerkingar, vegna geografiskt valdar skúlar, sum kunnu taka fólk inn í sjálvlestur. Talan er um Tvøroyri, Giljanes í Vágunum, Runavík, Klaksvík og Tórshavn.

Aldursmarkið uppá 18 ár, er tikið burtur soleiðis at nú kunnu eisini eldri melda seg til fjarlestur. Grundin sigst vera broyttur hugburður um útbúgving.

Eitt depositum fyri hvørja lesigrein uppá 600 kr., sum verður afturgoldið tá næmingurin hevur tikið prógvið. Gjaldið eigir at sáldra burtur tær óseriøsu næmingarnar, og soleiðis gera fyrireikingina til próvtøkuna bíligari.

MS bólkurin viðmerkti, at samb. uppskotinum hava næmingar á Sandi ikki møguleika at fara til próvtøku í oynni.

Svarskriv er sent Mentamálaráðnum 7. desembur.

Fundarsamtykt: Svarskriv góðtikið.

*Støða: Svarskriv til MMR 8. desembur 2011, merkt 09-159_3*

**Fundarmál nr: 55**

FKF Jour. nr: 09-161

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Býarskipanarnevndin, limur

Málslýsing: Í skrivi dagf. 30. novembur, bjóðar Innlendismálaráðið felagnum, at skjóta upp lim og varalim í býarskipanarnevndina.

Sambært lógini, skal landsstýrismaðurin velja 3 limir, meðani FKF g KSF velja hvør sín lim, sum skulu vera byggikønir.

Innlendismálaráðið minnir á jávnstøðulógina, soleiðis, at bæði maður

og kvinna skulu vera í uppskoti.
Eisini verður minnt á, at limirnir í metingarnevndini ikki kunnu veljast:
Ari Johannesen, cand.merc. Formaður, Marja Lamhauge, íløguráðgevi
Tiltakslimir:
Suni Christiansen, verkfrøðingur, Súsanna í Búðini, bóndi.

Fundarsamtykt: Jógvan K. Mørkøre og Hildur Vestergaard.

*Støða: Svarskriv til IMR 14. desembur 2011, merkt 09-161_2.*

**Fundarmál nr: 56**

FKF Jour. nr: 09-163

Reist av: Eysturkommunu

Fundarmál: KAF limaskapur

Málslýsing: Sum kunnugt so hevur Eysturkommuna sagt limaskap sín í FKF upp frá 1. januar 2012 at rokna.

Eysturkommuna søkir FKF um framhaldandi limaskap í KAF.

Viðmerking: Johan fer úr hølunum undir viðgerðini.

Fundarsamtykt: Eysturkommuna fær játtað limaskap í KAF ígjøgnum felagið.

*Støða: Svarskriv til Eysturkommunu 14. desembur 2011, merkt 09-163_2*

**Fundarmál nr: 57**

FKF Jour. nr: 09-162

Reist av: Almannaráðnum

Fundarmál: Eldrabýli, gjøld fyri tænastur og innivist

Málslýsing: Formaðurin greiðir frá fundi við Ism um broytingar í kunngerðum sum hava við sær, at frá 1. jan 2012, skulu pensionistar gjalda fyri búpláss og tænastur frá heimahjálpini. Hetta er avleiðing av nýggju pensionsskipanini. Sí skjal 57.

Hoyringsfreist er 16. desembur.

Fundarsamtykt: Formaðurin greiðir frá fundinum, har 30-40 fólk vóru møtt at fáa kunning um støðuna. Allar kunngerðir vóru tiknar úr gildi innan løgtingsvalið. Nú skulu allir pensionistar fáa sína pension og gjalda stovnspláss og tænastu frá heimahjálpini. Gjaldið er

inntøkuávirkað, størri inntøku, hægri gjald.

Semja er um, at kommunurnar skulu hava ávirkan á gjaldið, tí heimini eru ymisk í rakstri, og tí er tað ikki rætt, at hava eins gjald fyri øll heimini.

Kommunurnar eiga at vera við í ásetingini av gjaldinum fyri pláss.

Viðv. náttarvaktini, verður enn eina ferð gjørt vart við, at útreiðslan ikki hoyrir kommununum til, tí kommunurnar bert hava húsaútreiðslurnar og ikki røktarútreiðslurnar.

Kanna, hvør skal gjalda fyri umlætting aftaná 90 dagar, sum ásett í kunngerðini og um kommunan tá rindar í heimildaleysi.

*Støða: Svarskriv 09-162_8 sent AMR 16. desembur*